Hans Pauli Strøm:

# Trygd fyri bráðfeingis bíðilista

**- Stig eru nú tikin, so sleppast kann undan misskiljingum, tá kvinnur fáa ávísing til mammo-grafikanningar. Megnar Lands-sjúkrahúsið fram-vegis ikki at kanna hesar kvinnur inn-an rímiliga tíð, eiga tær at verða sendar aðrastaðni uttan nakra diskussión, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýris-maður í heilsumálum**



*Framyvir verður tað læknin, og ikki kvinnan sjálv, sum vendir sær til Landssjúkrahúsið, so sleppast kann undan misskiljingum, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum*

BÍPILISTI Á LSH
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

– Bráðfeingis tilburðir eiga undir ongum umstøðum at enda á vanliga bíðilistanum til mammografi-kanningar. Tískil fingu allir kommunulæknar í Føroyum í gjár boð um, sjálvir at venda sær til røntgendeildina, tá teir ávísa eini kvinnu til mammografi-kanning. Tað er nevniliga alt avgerðandi, at røntgendeildin fær púra greið boð um, hvørt kvinnan skal setast á tann vanliga ella bráðfeingis bíðilistan. Hetta sigur Hans Pauli Strøm, nú hann hevur kannað, hvør trupulleikin við langa bíðilistanum til mammografi-kanningar í veruleikanum er.

### Læknin boða frá

Higartil hevur mannagongdin verið tann, at kvinnan, eftir at hava fingið ávísing frá læknanum, sjálv setur seg í samband við Landssjúkrahúsið fyri at avtala eina tíð til mammografi-kanning. Sambært landsstýrismanninum hendir tað seg tíverri, at kvinnan ikki fær greitt nóg væl frá, hvør orsøkin er til kanningina. Tað er eftir øllum at døma hetta, sum er or-søkin til, at onkur bráð-feingis tilburður er endaður á vanliga bíðilist-anum. Tí er áðurnevnda skriv sent øllum kommunulæknum, fyri at tryggja, at kvinnan kemur á rættan bíðilista, sigur Hans Pauli Strøm.

Spurdur, um heilsu-myndugleikarnir framvegis ætla at fara undir mammografi-screeningar (fólkakanningar, blaðkv.), so leingi verandi trupulleiki við bíðilistanum á Landssjúkrahúsinum ikki er loystur, sigur landsstýrismaðurin, at hesi bæði málini ikki beinleiðis hava nakað við hvørt annað at gera. Og tó.

- Áðrenn farið verður undir at gera screeningar, mugu vit meta um, um fyritreytir eru fyri tí. Og bíðilistin á landssjúkrahúsinum hevur sjálvsagt týdning fyri eina slíka meting. Fyribils er ein lækni afturat til røntgen-deildina raðfestur høgt í tilmælunum til komandi fíggjarlóg. Hvørja viðgerð hetta tilmælið fær, ber ikki til at siga í løtuni, sigur Hans Pauli Strøm.



## FAKTA

Tal á mammografi-kanningum á LSH:
1995: 364 kanningar
2004: 503 kanningar

Samlaða tal á røntgenkanningum:
1995: 18479 kanningar
2004: 23979 kanningar

Á deildini starvast 4 læknar og 9 røntgen starvsfólk.
Talið á starvsfólkum hevur verið óbroytt seinastu 20 árini

ein røntgenlækna afturat, men enn er onki hent.

### Misskiljing

Jógvan Dahl Niclasen skilur ikki rættiliga, hví ein kvinna, sum hevði bráð-feingis tørv á mammografi-kanning, ikki varð tikin fram um onnur á bíðilistanum. Talan má vera um eina misskiljing, heldur hann, tí deildin vanliga roynir at leggja upp fyri slíkum bráðfeingis tilburðum.

Spurdur, hvørja ávirkan langa bíðitíðin kann hava, tá tað snýr seg um ein knykil í bróstinum, minnir Jógvan á, at hetta er ikki hansara serøki. Men eftir, tí hann skilur, hava nakrar vikur neyvan tann stóra týdningum, tá talan sum oftast er um ein knykil, sum hevur verið leingi ávegis. Hinvegin er sálarliga trýstið og óttin, hesar kvinnur ganga við so leingi, ein ivaleysa nóg góð orsøk fyri, at gera alt fyri at stytta um bíðilistan, sigur Jógvan Dahl Niclasen, yvirlækni.



# Knút H. Eysturstein í Rex

**Í kvøld, fríggja-kvøld, fer Knút Háberg Eysturstein á pall í Rex í Havn og óivað eru mong av løgunum av fløgu hansara at hoyra, teirra millum vælkenda lagið frá 15 teimum bestu í ÚF, Í hesi nátt**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið fer Knút Háberg Eysturstein á pall í Rex. Hann eigur eitt av best dámdu løgunum á 15 teimum bestu í ÚF í longri tíð, nevniliga Í hesi nátt av fløgu hansara Havsglóð.

Havsglóð er fløga, sum leiðir aftur á slóðina, har Knút leikti við prix vinnandi bólkinum "Gestir".

Ferðin er hin sama: sera hóvlig. Góð løg, sein og stillfør. Hann og løgini hava góða tíð. Eins og Gestir høvdu/ hava tað.

Fløgan er kosin sermerkt og at hava nakað upp á hjarta.

Og hetta er sermerkt við tónleikinum hjá Knúti. Har er líkasum nakað meira aftanfyri. Hetta er tónleikur, ein veruliga lurtar eftir og ikki bert setir í fløgu-spælaran soleiðis hissini.

Og løgið er tað, tí tekstirnir eru ofta stuttir, men beinraknir og grivið verður djúpt, men ikki ofta verður spakin settur í. Fáorðað, men djúpt.

Tónleikurin birtir uppundir, stuðlar og ber verkið, tí væl er farið um.

Ein kemur at hugsa um orð sum spirituelt, tá fløgan skal lýsast í stuttum. Her eru orð og kenslur, men tónleikurin syrgir fyri, at mest av øllum er tað ein kensla, ið er felagsglóð gjøgnum alla fløguna.

Og at orð og tónlekur nerta við, er eingin ivi um. Fløgan megnaði at halda sær á ovarliga á 15 teim bestu í vikuvís. Fløgan hevur prógvað sítt virði - í hvussu er á heimamarknaðinum. Hvussu fer at gangast uttan fyri landoddarnar, vil tíðin vísa.

### Rex

Og í kvøld, fríggjakvøld, fer Knút á pall í Rex í Havn. Har fara spitituellu orðini og tónarnir at royna flog. Knút hevur í viðtali sagt, at tað er Ok at vera kiksaður, men neyvan eru hetta fyrstu orðini, ið fella lurtarunum í huga. Og neyvan heldur á Rex, har Knút fríggjakvøldið fer at skapa eitt huglag, mynd-að av orðum og tónum, ið vilja nakað og hava eina meining - ið hava nakað upp á hjarta.